# TAÐ HENDIR ...

**LAGT TIL RÆTTIS:** Eyðun Klakstein

## PÁLL FINNUR PÁLL ÚR AT GERA



Ein av bestu umtóktu føroysku poppbólkunum í løtuni kunnu upplivast í Havn um vikuskiftið. Páll Finnur Páll spæla bæði til tiltak í ítróttarhøllini á Hálsi, og teir hava eisnii framførslu á dansistaðnum Rex í Havn. Páll Finnur Páll hava seinasta árið verið ein av populerastu live-bólkum í Føroyum, og nú verður aftur møguleiki at hoyra teir spæla í Føroyum.

**PÁLL FINNUR PÁLL**
Høllin á Hálsi & Rex
Leygarkvøldið 18/12



## LÆRA AT MÁLA GRAFFITI

Fríggjadagin og leygardagin skipar Live aRt fyri tiltøkum í Havn. Talan er um ein sonevndan Graff Tour í Føroyum. Úr Danmark koma Rasmus Balstrøm og Alexander Witting, sum skulu undirvísa og mála. Úr Føroyum eru tað Teitur Kass Abrahamsen, Elsa Helena Magnussen og Erik Reidarsson Klein, ið vera tey, sum vísa eitt listarligt graffiti verk. Í hesum sambandi skipa vit fyri einari graffiti verkstovu í Tórshavn.

GRAFFITI VERKSTOVA
Tórshavn
Fríggjadagin 17/12 og leygardagin 18/12

## JÓL Á RÁS2

Rás2 er í ræ ttiligum jólahýri í hesum døgum. Umframt vanligu sendingarnar, sum eru nakað merktar av jólum, er eisini serlig jólasending seinnapartar hvønn gerandisdag. Og Rás2 sendir eisini alt komandi vikuskiftið. Sent verður bæði leygardagin og sunnudagin, og tá ber til at hoyra góðan jólatónleik, vinna góðar vinningar og hoyra prát við fólk.

JÓL Á RÁS2
Leygardagin 18/12 kl. 14-20
Sunnudagin 19/12 kl. 14-20




## HANNIS AFTUR Í BRENNIDEPLINUM

Færøernes Mellem- og Realskole er ein vakran dagin í mai 1935 á útferð í Lamba fyri at síggja og hoyra um útgrevsturin eftir Norsku Løvu, sum fór á land nýggjársaftan 1707. Á útferðini hvørvir ein fjúrtan ára gamal drongur, og 75 ár seinni biður beiggi drongin Hannis Martinsson um at hjálpa sær við at fáa greiðu á málinum. Hóast Hannis ikki hevur nógv álit á, at tað skal lukkast at finna fram til nakað so nógv ár seinni, tekur hann av. Brátt er hann fløktur inn í eina røð av ósvaraðum spurningum og deyða. Nýggj krimisøga um Hannis Martinsson.

JÓGVAN ISAKSEN
Norska Løva



## LEIKHÚSJÓL Í HAVN

Seinastu tíðina hava tey spælt leikin Millum Skins Og Hold í Sjónleikarhúsinum í Havn. Hetta eru árligu Leikhúsjólini, tey kalla. Leikurin heldur fram komandi dagarnar og verður sýndur hvørt kvøld fram til 22. desember.

LEIKHÚSJÓL
Sjónleikarhúsið í Havn
17/12- 22/12 kl. 18

## Tey stóru bresta saman

**Seinnu árini hava Manchester United og Chelsea verið í hørðum stríði í toppinum í enskum fótbólti, og bæði liðini eru framvegis millum tey fremstu. Nú bresta tey saman til stórdyst í London. Chelsea, sum hevur snávað fleiri ferðir seinastu vikurnar, skal nú vísa, at felagið, sum er enskur meistari í løtuni, kann endurvinna meistaraheitið í hesum kappingarárinum.**

**CHELSEA-MANCHESTER UNITED**
Premier League
Sunnudagin 19/12 kl. 16.00

